# Heildarmenning av barninum í *Rokning*

Í 2014 fór Nám undir at geva út nýggja bókarøð til støddfrøði, ***Rokning***. Hesar bøkurnar eru týddar eftir norsku røðini ***Multi***. Ætlanin er at geva út bøkur til 1–2 árgangir um árið.

**Tekstur:** Elin Henriksen / **Myndir:** Beinta Viðstein

Í *Rokning* hava læraraleiðbeiningarnar minst líka stóran týdning sum sjálvar næmingabøkurnar. Her verður tískil greitt eitt sindur frá teimum. Dentur verður serliga lagdur á tey sjónarmið, sum tilfarið er grundað á. Tess størri kunnleika lærarin hevur til sjónarmiðini aftan fyri lærubøkurnar, tess betur fær hann gagnnýtt tær.

Ein týðandi munur á „gamaldags" lærubókum og hesum nýggja slagnum er, at meðan tær „gomlu" í høvuðsheitum snúðu seg um at kunna um fakta, greina og viðgera evni, læra ávísar førleikar, so eru tær „nýggju" í nógv størri mun knýttar at nýggju námsætlanunum og førleikamálunum har. So statt hevur heildarmenningin av næminginum nógv størri leiklut. Tað verður ikki bara spurt: Hvat skal næmingurin duga av hesum innihaldinum, men eisini: Hvussu mennir arbeiðið við hesum innihaldinum næmingin sum heild, so sum evni at læra, hugsa og at taka avgerðir. Læraraleiðbeiningarnar eru amboð hjá læraranum at røkka út um tað fakliga innihaldið til at gerast tilvitandi um, hví og hvussu arbeitt verður við tí.

Greinin um *Rokning* er í fullari longd á heimasíðuni www.skulabladid.fo.

## Hvat fevnir *Rokning* um

Í byrjanarheildini er til hvønn árgang:

- Tvær einnýtis næmingabøkur, *Grundbók a* og *Grundbók b*
- Til teirra hoyra: *Lærarabók a* og *Lærarabók b*
- Á heimasíðuni snar.fo/rokning er tilfar til teldu og samvirkna talvu[i]
- Harumframt er *Avritsmappa 1–4*, sum er ætlað allari byrjanardeildini

Hetta tilfarið skal vera fatað sum ein heild. Hyggur onkur í Grundbøkurnar og væntar eina fullfíggjaða roknibók, so verður hann ivaleyst vónbrotin. Verður Lærarabókin ikki brúkt, so fæst ógvuliga lítið burtur úr av tí, sum er ætlað við bókaheildini.

Hvør opna í Lærarabókunum er gjørd soleiðis, at hon samsvarar við hvørja opnu í Grundbókunum. Har er ein neyv frágreiðing um, hvussu arbeitt kann vera við evninum, og har er svarlisti.

### *Rokning* leggur dent á trý høvuðsøki:

- At arbeiða praktiskt, granskandi og skapandi í fjølbroyttum virksemi.
- At tillaga læringina innan fyri felagsskapin um læring.
- At leggja týðiligan dent á tað fakliga innihaldið og stigvísa framtøku.

## At tillaga læringina innan fyri felagsskapin um læring

Tað vil siga, at allur flokkurin arbeiðir við sama evni, samstundis sum undirvísingin er næmingalagað. Í hvørjari opnu í Lærarabókini





verður greitt frá, hvussu undirvísingin hendan dagin kann verða lagað til teir næmingar, sum hava tørv á at arbeiða meiri við tí grundleggjandi tilfarinum á einfaldan hátt, og hvussu lærarin kann geva teimum næmingum eyka avbjóðingar, sum hava tørv á tí. Tað verður avgjørt mælt til, at allur flokkurin fylgist. Umframt tilfarið í Lærarabókini er eyka tilfar at finna á heimasíðuni og í Avritsmappuni.

Harumframt er ein hópur av uppskotum til ymiskt virksemi og spøl, har allir næmingar kunnu vera saman og fáa nógv burtur úr, hóast teir eru á ymsum stigum og læra við ymiskari ferð.

### At leggja týðiligan dent á tað fakliga innihaldið og stigvísa framtøku

Hvør kapittul snýr seg um eitt ávíst evni í støddfrøðini. Lærarabókin hevur samrøðumyndir um, hvat næmingarnir vita um evnið at byrja við, og hvat miðað verður ímóti at læra um evnið. Mælt verður til at enda hvønn tíma við í felag at taka samanum, hvat er lært hendan dagin. Í sambandi við tær einstøku uppgávurnar, virksemið og spølini verður javnan viðmerkt, hvat fakliga endamálið við júst hesum er. Tað er sostatt ikki bara lærarin, sum verður leiddur inn í fakligt innihald og stigvísa framtøku – næmingarnir skulu eisini gerast tilvitandi um hetta.

### At arbeiða praktiskt

Eitt grundleggjandi frálærufrøðiligt sjónarmið í *Rokning* er, at farið verður frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. Í fyrstu bók verður byrjað við at bólka lutir eftir eginleikum. Her hevur tað stóran týdning, at næmingarnir arbeiða við ítøkiligum lutum, áðrenn teir fara undir at arbeiða við myndunum í Grundbókini. Síðan verður farið at telja – aftur ræður um at telja ítøkiligar lutir á ymsan hátt, áðrenn farið verður undir at telja lutir á myndunum.

**Tess størri kunnleika lærarin hevur til sjónarmiðini aftan fyri lærubøkurnar, tess betur fær hann gagnnýtt tær.**

Hjá næminginum er ikki altíð, at hugur og evni til rokning fylgist við fínrørsluligu menningini, sum krevst at skriva tøl í roknibók ella hefti. Í uppskotunum til praktiskt virksemi í Lærarabókunum verður stórur dentur lagdur á at arbeiða nógv – heilt nógv – við praktiskum, ítøkiligum lutum og høvuðrokning heldur enn at gera so nógv burtur úr tí skrivliga partinum.

At arbeiða ítøkiliga vil eisini siga at nýta kroppin í rokning. Serliga tað fyrsta árið hevur Lærarabókin ein hóp av hugskotum til, hvussu tað kann vera gjørt. Líka frá at gera talstavir og mynstur við kroppinum til uttandura spøl, har bæði verður hoppað og runnið.

Rættiliga nógv av tí, sum í Lærarabókunum er bólkað undir *Annað virksemi*, eru ymisk spøl, sum stuðla talfatan og menna rokniførleika. Umframt at stuttleika sær við spølunum er eisini meiningin, at næmingarnir gerast tilvitandi um, at spøl eru góð at læra at rokna av. Tað fyrsta árið eru sangir og ramsur somuleiðis partur av praktiska virkseminum.

### At arbeiða granskandi

Lærarabókin viðger ikki bara, hvat lærarin skal siga næmingunum. Hon snýr seg eisini um, hvat lærarin *ikki* skal

[i]Tiverri er tilfarið ikki enn tøkt til teldlar. Har er neyðugt at nýta serligan kaga, og tað gongur heldur seint. Men tilfarið fer at verða dagført soleiðis, at tað eisini fer at verða lætt at nýta í teldlum.

Hetta er fyrstu ferð, vit báðar møta einari so góðari og grundleggjandi bókarøð til innskúlingina.

Námsfrøðiliga fara bøkurnar heilt niður í smálutir. Næmingarnir læra at kenna tøl, virði á tølum og mongdina frá grundini. Hetta verður gjørt við at skilja sundur, savna saman, bólka mongdir og telja eindir og mongdir. Út frá hesum háttum at arbeiða við tølum, hava næmingarnir fingið amboð at gera sínar egnu mannagongdir at telja upp í heilt stórar mongdir.

Læraravegleiðingin er framúr góð og kveikjandi og greið og løtt at fylgja. Ein hollur stuðul í undirvísingini er eisini alt tað teldutøka tilfarið

– Fríða Eysturoy og Beinta Viðstein, Venjingarskúlin

siga næmingunum, men heldur lata tey sjálv finna útav. Vitan og førleikar, sum næmingarnir sjálvir ogna sær á sín egna hátt, sita fastari. Tað stimbrar somuleiðis sjálvsálitið og álitið á, at „eg dugi at læra“. So heldur enn at greiða næmingunum frá, hvat og hvussu teir skulu gera, er tað uppgávan hjá lærarانum – við hjálp úr Lærarabókini – at leggja undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingarnir sjálvir granska og finna sín egna máta at loysa uppgávurnar og finna svarini. Nógvar uppgávur eru enntá gjørdar soleiðis, at tær ikki bara hava eitt rætt svar. Finnur næmingurin eitt annað svar enn tað, sum stendur í svarlistanum, so biður lærarin næmingin greiða frá, hvussu hann er komin fram til júst hetta svarið. Síðan kunnu næmingarnir skifta orð um teir ymsu møguleikarnar.

Tann parturin av støddfrøðini, sum hevur við beinleiðis talviðgerð at gera, fer í fyrsta lagi fram sum høvuðrokning. Endamálið við tí, sum næmingarnir rokna í teimum fyrstu Grundbókunum, er ikki at læra framferðarhættir í skrivligari rokning, men at menna ymsar mátar at hugsa talsambond og at fata ymsar meginreglur, t.d. tíggjaravinir, tvífalding og helvtarbýti og støðubundnu talskipanina. Við at arbeiða við evnunum á sera fjølbroyttan hátt ber til hjá næmingunum at finna sín egna máta.

**Læraraleiðbeiningarnar eru amboð hjá lærarانum at røkka út um tað fakliga innihaldið til at gerast tilvitandi um, hví og hvussu arbeitt verður við tí.**

Stórur dentur verður lagdur á at duga uttanat og at læra at rokna í høvdinum, ella sum tað eitur við fínari orðum, at „automatisera faktakunnleika“. Við at duga grundleggjandi talsambond uttanat og at rokna í høvdinum verður orka tøk til at arbeiða granskandi og skapandi við støddfrøðini.

## At arbeiða skapandi

Umframt tann skapandi partin av granskandi arbeiðinum eru nógvar uppgávur og nógv virksemi, har næmingarnir sjálvir seta spurningarnar. Tey skulu eisini javnan loysa uppgávur, har einki endaligt svar er, men har svarið ella loysnin sprettur úr teirra egna skapandi virksemi. Eitt dømi um hetta eru *roknisøgurnar*, sum eru í Lærarabókunum. Við at lurta eftir roknisøgum – í fyrstuni saman við ítøkiligum lutum – gera næmingarnir sær sínar egnu myndir av tí, sum fer fram, og roknistykkið er tá ikki bara úrtøkilig tøl. Næmingarnir verða eisini eggjaðir til at gera sínar egnu roknisøgur, sum teir tekna ella skriva í kladduheftið.

Tess fleiri liðug hugtøk og endalig svar børnini fáa ella skulu finna eftir einum leisti, sum tey onga ávirkan hava á, tess bundnari gerast tey at „uppskriftum“ – í breiðari merking. Hinvegin, tess meiri tey arbeiða við opnum spurningum, við sjálv at seta spurningar og við skapandi virksemi, tess betri møguleikar hava tey fyri at menna eina liðiliga og skapandi hugsan, ið kann verða nýtt at loysa ókendar trupulleikar – ikki bara í støddfrøði.

Eg havi havt so mikið gott eyga á **Rokning**, at eg havi brúkt hesa røðina í norskari útgávu seinastu 6 árini. Gleðiligt er, at vit nú fáa hana á føroyskum og at kunna brúka fyrstu bøkurnar í innskúlingini.

Læraravegleiðingin hevur lært meg nógv, eisini tí at eg havi ikki støddfrøði á linju. Í henni eru ítøkilig uppskot til prát, sum **Rokning** leggur stóran dent á, og uppskot til ymiskt virksemi í sambandi við evnini, vit arbeiða við. Hugskot eru eisini til minni og meira avbjóðandi uppgávur, so lættari er náa einstaka næminginum. Til verkstaðarundirvísing er **Rokning** eisini væl egnað, haldi eg.

Næmingabøkurnar eru greiðar við ítøkiligum myndum og stuttum setningum, sum næmingarnir kunnu lesa sjálvir. Foreldur hava verið glað fyri, at niðast á síðunum ber til at lesa tað, ið gerast skal.

– Karin Jógvansdóttir, Leirvíkar Skúli

## Fjølbroytt virksemi

Samanumtikið kann sigast, at við bókaheildini *Rokning* er talan um undirvísingartilfar, sum gevur møguleikar fyri heildarmenning av barninum, har fjøltáttað talfatan er eitt amboð.

Ofta er tað fyrsta, vit hugsa um, tá ið vit hoyra ella síggja eitt tal, tann kvantitativa eginleikan við talinum, t.e. hvussu nógv er til av onkrum ávísum. At nýta tølini at telja við er nær tengt at tí at hugsa. Skulu vit staðseta tann kvantitativa eginleikan við tølum, so hoyrir hann saman við hugsan, við høvdinum. Í byrjanarstøddfrøði arbeiða vit við tí kvantitativa eginleikanum við tølum í sambandi við at bólka, telja eindir, leggja saman og draga frá, falda og býta.

Tølini hava eisini ein rytmiskan eginleika, sum m.a. fevnir um tað, ið hevur við tíð at gera. Tíðin við samdøgrinum og árstíðunum hevur sína rytmu, og kroppurin hevur sína rytmu við andadrátti, hjartaslráttri o.s.fr. Tónleikurin má eisini nevnast, og knýtt at tónleikinum eru okkara rørslur í sangi og dansi. Skulu vit staðseta tann rytmiska eginleikan við tølum, so hoyrir hann til rørslur, kroppin. Í byrjanarstøddfrøði arbeiða vit við tí rytmiska eginleikanum við tølum í sambandi við at telja, støðubundnu talskipanina, tabellir, mynstur og tíð.

Ein triði eginleiki við tølunum er tann kvalitativi. Hesin er kanska tann torførasti at fáa fatur á, tí vit eru ikki

**Við bókaheildini *Rokning* er talan um undirvísingartilfar, sum gevur møguleikar fyri heildarmenning av barninum, har fjøltáttað talfatan er eitt amboð.**

von at vera so tilvitandi um hann. Tað er torført at seta orð á, hvør munur er á upplivingini av t.d. „fýra“ og „seks“ sum hugtøk. Tann kvalitativi eginleikin við tølunum kemur ofta til sjóndar í ævintýrum og frumsagnum, og skulu vit staðseta hann nakrastaðni, so er tað fyrst og fremst við kenslunum, vit kunnu fata hann. Í byrjanarstøddfrøði arbeiða vit við tí kvalitativa eginleikanum við tølum í sambandi við geometri og talsambond. Harumframt verður í sambandi við innleiðslu til tølini mælt til at siga frá ævintýrum, har tøl hava ein leiklut.

Við at nýta Lærarabøkurnar saman við Grundbókunum í *Rokning* verður arbeitt miðvíst við øllum hesum trimum eginleikunum við tølunum. Og harvið verður støddfrøði ein lærugrein, sum medvirkar til eina heildarmenning av barninum.

## Avbjóðingar til læraran

Viðhvørt kanst tú sum lærari spyrja, hvat tey hava hugsað fyri sær, sum gjørdu hesa læraraleiðbeiningina – hvussu skal eg kunna gjøgnumføra alt hetta? Í *Rokning* er nú heldur ikki meiningin, at nakar skal gera *alt*, sum bøkurnar lata upp fyri. Har er so mikið nógv í at velja, at hvør lærari má velja tað burturúr, sum er mest viðkomandi fyri seg og sínar næmingar.

Greinin um **Rokning** er í fullari longd á heimasíðuni **www.skulabladid.fo**